

*Abemor skulle føde hjá Kathrine Ærtebjerg*



*Eitt av framúrskarandi verkunum hjá Tal*

sum hann gjørdi í Grafiska Verkstaðnum, eins og hann luttók í framsýningini "Natúrligvís" í Norðurlandahúsinum í fjør. Men verkið "One World", sum nú verður framsýnt á Charlottenborg, líkist ikki nøkrum av tí, hann hevur framsýnt í Føroyum. Hetta er ein uppseting av leirlutum, sum at síggja til minna um teir meir og minni formleysu lutirnir, sum vit gleddu foreldur okkara við í barnaskúlanum. Tó er okkurt við uppsetingini í einum sýningarskápi úr glasi, ið tykist so mikið hátíðarligt, at áskoðarin verður standandi eina løtu. Tá sæst, at hetta í veruleikanum er ein líkkista, eitt sarkofag við beinagrind og ymsum lutum (m.a. ein kirkja og eitt listasavn), ið alt kundi verið ein viðmerking til okkara vónleysu roynd at samla saman lutir, vitan og royndir í lívinum, sum jú ikki kunnu brúkast til nakað í deyðanum. Ikki dugi eg at síggja sambandið við framsýningarevnið um tað danska, eins og eg ikki enn havi skilt heitið á verkinum, sum heldur mátti verið "One life" ella hvat? Men óansæð er vælgerandi við slíkum verkum, sum fáa heilakyknurnar í umferð.

## Tal R og Ólafur Eliasson

Tveir aðrir listamenn, sum í denn grad eru inn og altjóða viðurkendir eru Tal R og Ólafur Eliasson. Síðstnevndi sýnir fram eitt av sínum fyrstu verkum, sum møguliga hevur verið áhugavert í 1993, men sum altso ikki hevur nógv uppá seg í dag. Í so máta er tað ein trupulleiki




*Stóra verkið DANMARK við inngongdina í Charlottenborg*

at blanda gomul verk uppí eina samtíðarliga listaframsýning. Verkið við heitinum "Mental" (1993) fevnir um eitt rúm við hjartaljóði, har allur endaveggurin er spegilsklæddur. Hetta førir við sær, pápeikar framsýningarteksturin eitt sindur algoystur, at bæði rúmið og talið av fólkum, sum inni eru, verður dupult so stórt. Javel, suffar ummælarin spakuliga meðan hon staðfestir, at hetta minnir nokkso nógv um eitt av teimum spektakuleru sovikamarunum úr áttatiárunum (bara uttan songina við plúss og innbygdum ljósi, digitalum uri og barr). Tal R byrjaði sína listarligu leið í Billedskolen á Nørrebro í Keypmannahavn, har eisini fleiri føroysk listafólk hava gingið, t.d. Jensina Olsen og Øssur Johannesen. Eins og Kathrine Ærtebjerg sigur Tal R lívssøgur við sínum myndum, ið virka sum eitt slag av dagbók hjá honum. Stílurin er tó heilt øðrvísi og ikki einfaldur og ævintýrskendur sum hjá Ærtebjerg. Upplivingar verða tveittar á lørift, ofta í kollasjum, uttan so nógv atlit til um vit áskoðarar fata tær á rættan hátt, heldur verða atlit tikin út frá sjálvum verkinum og frá hvat verkið krevur fyri, at tað fungerar sum listaverk. Verkini eru sera ymisk og tessvegna broytast treytirnar allatíðina frá verki til verk.

## Videolist

Fleiri videoinstallatiónir eru við á framsýningini, men bert ein, sum næstan uppfyllti krøv ummælarans til góða videoinstallatiónslist. Tað er ikki lætt av definera videolistina, sum er grundleggjandi markleys, men allíkavæl vil eg halda uppá, at videolistin næstan er líka misnýtt og hjá summum og helst eisini eins ómakaleys sum haiku. Alt ov nógv videolistaverk eru púra vanligir filmar við eini framhaldandi hendingagongd, hvørs leikstjórar ikki tykjast serliga tilvitaðir um videolistasjangruna. Øðrvísi og spennandi er verk Joachim Koesters: "Morning of the Magicians" (2006), sum sambært framsýningarskránni tekur støði í vitjan listamansins í Cefalú í Sisilia í húsunum, har enski rithøvundurin og okkultisturin, Aleister Crowley búði saman við viðhaldsfólkum í 1920´num. Nógv spennandi er at lesa um hendan Crowley, sum eitt nú inspireraði David Bowie og The Beatles og sum t.d. sæst á fløguhúsanum til Sergent Pepper. Men lov og takk er als ikki neyðugt at lesa alla tað longu søgurna fyri at fáa nakað burtur úr verkinum hjá Koester, hvørs kámu, svarthvítu myndir eyðsýniliga verða framvístar við gamaldags filmsapparati. Eyðkenda dukandi ljóðið frá filmsapparatinum alir saman við kámu og grovkornutu myndasíðuni fram eitt einastandi mystiskt og suggestivt huglag.

## Spjødd framsýning

Góðskustøðið er sum heild høgt á upplatingarframsýning Kunsthal Charlottenborgs. Hetta er ikki ein samanhangandi temaframsýning, men heldur ein "20 tey bestu" framsýning við tjúgu smáum serframsýningum hjá frammanundan viðurkendum listafólkum og sostatt minnir hon ikki lítið um listabólkaframsýningarnar, sum plagdu at vera í Charlottenborg og sum eisini plagdu at vera góðar, summar framúr. Broytingin skal eitast at vera breiðu listini til góðar og tryggja, at tað ikki bert eru tey somu listafólkini, sum aftur og aftur brúka hølini. So er spurningurin um tað ikki endar við, at tað aftur verða tey somu listafólkini, men nú nøkur onnur eitt sindur yngri listafólk, sum aftur og aftur fara at brúka vøkru hølini á Kongens Nytorv. Framsýningin er at síggja inntil 24.mars. 2008. Sí www.kunsthalcharlottenborg.dk